


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 11 - 2011

# Góðar vónir um olju við Jan Mayen

Ein frágreiðing, sum norska oljustýrið og lærdi háskúlin í Bergen hava skrivað, og sum byggir á tilfar frá hellingini við Jan Mayen-ryggin, økir sannlíkindini fyri, at olja kann vera í økinum. Sissel Eriksen, sum er leitistjóri hjá oljustýrinum, sigur við fjølmiðlarnar, at kanningar av havbotninum við Jan Mayen hava avdúkað, at har er munandi minni gosgrýti, enn granskararnir høvdu roknað við. Harafturímóti er nógvur sandsteinur, og hesi viðurskifti gera sambært leitistjóranum, at fyritreytirnar fyri olju og gassi eru til staðar. Tað var í summar, at granskarar kannaðu hellingina við Jan Mayen. Tað bleiv gjørt við havrannsóknarskipinum G.O. Sars og einum fjarstýrdum undirvatnsbáti. Eftir avtalu við íslendsku myndugleikarnar bleiv kanningin gjørd í norskum og íslendskum øki á Jan Mayen-rygginum, har dýpið er millum 600 og 2.000 metrar. Tey jarðfrøðiligu viðurskiftini vísa, at Grønland og Noreg vóru munandi nærri hvør øðrum fyrr enn í dag, og at í roynd og veru var tað stytri millum tey bæði londini, enn tað er millum Noreg og Bretland nú. Men londini fóru frá hvør øðrum í tveimum umførum, og Jan Mayen varð standandi eftir. Sissel Eriksen sigur, at enn kann oljustýrið ikki siga nakað um, hvussu nógv kolvetni kann vera á Jan Mayen-rygginum, men hon dylur ikki fyri, at hon er bjartskygd. Ætlanin er at gera fleiri seismiskar kanningar á rygginum næsta summar, og harafturat vil oljustýrið fegið sleppa at gera nakrar grunnar boringar fyri at fáa staðfest tær royndirnar, sum vórðu tiknar í summar. Í Íslandi eru myndugleikarnir fegnir um úrslitið av kanningunum á Jan Mayen-rygginum, tí tað fer væntandi at økja áhugin millum oljufeløg at søkja um loyvi at leita á íslendsku Drekaleiðini.